

*Aase Tendenes, samskipari av ONS Festivalini, gleðir seg ikki minst til at hoyra Eivør Pálsdóttir.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

# Selja Føroyar í oljuvinnu høvuðsstaðnum

**Vinarbýa samstarvið millum Tórshavn og Stavanger skal við oljumessuna í august hesuferð gagnnýtast í navninum hjá øllum Føroyum – við hjálp av Eivør Pálsdóttir og øðrum góðum**

MARKNAÐARFØRIN
Búi Tyril
*tyril@PRnewsMedia.com*

Vit eru komin fram á eitt smash hitt tá tað ræður um at fáa uppmerksemi kring alt sum føroyskt er mitt í norska oljuvinnu høvuðsstaðnum, nevniliga gjøgnum vinarbýa samstarvið millum Havnina og Stavanger. Her hava fyriskiparnir av ONS Festivalini tey seinastu fýra árini havt fragd av at bjóða sendinevndum av Klettunum við til at vísa upp serføroyska list og góðbitar av ymiskum slag.

Og tað hevur riggað væl, skilst. ONS Festivalin, sum verður hildin í sambandi við tað stóra altjóða Offshore Northern Seas framsýningar og ráðstevnu tiltakið annaðhvørt ár, kann reypa av einum exotiskum innslagi úr Tórshavn sum fær fólk at tysja til í túsundatali.

Afturfyri fáa føroyingar sum vera man eisini nakað burturúr. Stavanger býur bjóðar upp á tjaldið og ein ein part av kostnaðinum og tað er uttan iva hugaligt at kunna spreiða út føroyska reklamu til høgru og vinstru. Og, ikki at forgloyma, nógv fólk av tí frægara slagnum leita framvið eisini, og fyri eina spírandi føroyksa ferðavinnu kann tílíkt neyvan vera annað enn gott.

Yvirskriftin hjá føroyingunum verður tó meira enn 'Tórshavn' á hesum sinni. Tað skal breiðkast til allar Føroyar, og so við Runavík undir liðini á Havnini.

»Vit fara í ár at presentera okkum undir hattinum 'Føroyar: Tórshavn-Runavík',« upplýsti kommunustjórin í Havn, Jens Marius Poulsen.

»Vit arbeiða saman við Ferðaráð Føroya, Vinnuhúsinum, Atlantic Airways, Smyril Line og øðrum fyri at fáa í lag ein góðan føroyskan bás aftur í ár.«



*Tann væl umtókti listarmaðurin Helgi Joensen, ættaður úr Føroyum.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Ingrediensirnir byggja á vinnandi uppskriftir frá fyrr: sluppin Johanna við bryggju beint við tað føroyska tjaldið, Birgir Enni sum chef kokkur við øðu, fiskasúpan og føroyskum øli afturvið; síðani standa glarlist av Eiði og ullvørur frá Dianu Borgnyardóttir eisini ovarliga á menuini saman við grótlist av Strondum; og tá hava oyruni ikki fingið sítt - tey fáa mettuna frá ongum minni enn Eivør Pálsdóttir umframt einum ensemble undir leiðslu av Kristiani Blak. Sum skilst skal Eivør eisini framføra á tí stóra pallinum.

Síðani koma vit ikki uttan um tann føroyska listarmannin í Stavanger, Helga Joensen, sum eisini verður til staðar í tí føroyska tjaldinum. Helgi Joensen er væl etableraður í Noreg og aðrastaðni við; hann arbeiðir við einari serligari tøkni har tilfarið fyrst og fremst er tin.

»Tá eg fyrr í tíðini arbeiddi sum verkfrøðingur gjørdist eg varugur við hesar litríku og spennandi virknaðirnar sum uppstanda tá tin fær eitt sindur av viðgerð,« segði Helgi Joensen tá vit vitjaðu hann í Stavanger.

»Tin hevur jú langa traditión í Noreg bæði í brúks- og í prýðislutum. Í leitan eftir einum persónligum úttrykki havi eg ment ein nýggjan teknikk ið ger meg føran fyri at skapa frían form og abstrakt mynstur við einum serligum elementi av liti. Texturin er gjørdur við hond meðan metallið er partvís smeltað, uttan brúk av stoypiformum, og litirnir verða skapaðir gjøgnum eina oxideringar prosess. Hvørt stykki verður bygt í einum dynamiskum samspæli millum tað litaða, texturella umráðið og tann glitruta partin av tilfarinum. Uttan mun til um endamálið er funktionelt ella reint skulpturelt, so er hvørt verk heilt sítt egið.«





**Føroyar:** Føroya Kolvetni P/F · Bryggjubakki 22 · P.O. Box 1098 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel: +298 320 450 · Fax: +298 320 451

**Bretland:** Faroe Petroleum plc · 24 Carden Place · Aberdeen · AB10 1UQ
Tel: +44 1224 652 810 (switchboard) · Fax: +44 1224 643 243

e-mail: faroe-petroleum@faroe-petroleum.com · www.faroe-petroleum.com

Faroe Petroleum

Lloyd's Register

Lloyd's Register EMEA er ein óheft "risk management" fyritøka, ið arbeiðir fyri at betra kvalitets-, trygdar-, umhvørvis- og handilsliga úrslitið hjá kundanum um allan heimin. Okkar arbeiðsumráði umfatar shipping, ídnað á landi og somuleiðis olju og gass

Lloyd's Register Faroe Islands
FO-490 Strendur
Faroe Islands
Tel +298 44 82 75
Fax +298 44 79 79
E-mail: ole.lauritsen@lr.org
Web: www.lr.org

Building better business

RUNAVÍKAR HAVN ■ www.runavik.fo



Runavíkar Havn veitir tænastur innan oljuvinnu, umframt fiskivinnu,farmaflutning og ferðavinnu

Sosialurin 341800

RUNAVÍKAR HAVN · TEL 44 70 15 · FARTEL 22 51 14 · FAX 44 89 20 · VHF KANAL 16 · WWW.RUNAVIK.FO